

## Klaksvík jalig altjóða ummæli

Tíðindamaður frá kendu ferðabókini Lonely Planet skrivar hugtikin um Klaksvík: »The Faroe Islands form a mesmerizing 18-piece jigsaw puzzle, adrift between Iceland and Norway in the North Atlantic. Colorful villages huddle in emerald-green valleys beneath inscrutable barren peaks. Dramatic headlands plunge sometimes 1,000 feet into the frothing ocean swell. In Klaksvík, the Faroes' second 'city,' you could tour the Faroes' foremost brewery (by appointment), cruise in a beautiful 1940s sloop or take an easy 1 ¼-hour hike up to Klakkur viewpoint for some truly inspiring fjord-land panoramas. But don't miss Leikalund (Klaksvíksvegur 82; 011-298-457-151; www.leikalund.com). Tucked beside Klaksvík's loveable little museum, this unique bookshop/ music store/cafe features a cozy, wooden-beamed back room with occasional live music gigs.« Lonely Planet er ein hin mest virda ferðabók í heiminum, og tískil er tað ikki smávegis lýsingarvirði, ið Klaksvík fær frá Mark Elliott, tíðindamanni, skrivar Klaksvík.fo.

# Meiriluti í vinnunevndini mælir til trý prosent skerjing

**- Landsstýrið eigur at seta í verk vísindaliga kanning av áríninum av stóru økisfriðingunum við Føroyar. Heili 41% av landgrunninum eru friðað fyri trol, tó uttan at vit vita, hvussu nógv henda verja tryggjar fiskastovnarnar, sigur meirilutin í vinnunevndini**



*Teir fýra í meirilutanum í vinnunevndini, sum mæla til 3% skerjing av fiskidøgum í øllum bólkum, Jacob Vestergaard, Jákup Mikkelsen, Kári P. Højgaard og Gerhard Lognberg*



*Verður tað, sum meirilutin í vinnunevndini skjýtir upp, verður fiskidagatalið í komandi fiskiári skert við 3%*

*Mynd: Sjóborg*

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin fríggjadagin var vinnunevndin hjá løgtinginum liðug at viðgera málið hjá landsstýrismanninum í fiskivinnuálum um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap. Hetta er málið, sum snýr seg um fiskidagar og aðrar broytingar í fiskiveiðiskipanini fyri komandi fiskiár.

### Tríbýtt nevnd

Undir viðgerðini býtti vinnunevndin seg í ein meiriluta og tveir minnilutar. Soleiðis fekst ikki semja í nevndini um eitt felags álit og tilmæli til løgtingið um fiskidagar.

Tórbjørn Jacobsen hevur skotið upp at skerja fiskidagarnar hjá partrolarum við 20% og hjá húkaflotanum við 50% komandi fiskiár.

Men so stórum skerjingum tók eingin í vinnunevndini undir við.

Meirilutin í nevndini, sum í hesum førinum eru andstøðutinglimirnir Jákup Mikkelsen, Jacob Vestergaard, Kári P. Højgaard saman við Gerhardi Lognberg, tekur ikki undir við uppskotinum hjá landsstýrismanninum um so stórar skerjingar í fiskidøgum, men mælir í staðin til, at dagarnir verða skerdir við 3% í øllum bólkum.

Teir fýra taka heldur ikki undir við einvíst at skerja bólk 5, sum eru útróðrarbátar, við 5.000 fiskidøgum eyka. Meirilutin vísir á, at hesir dagarnir eru ein semja, sum er gjørd við allar skipabólkar, og teir halda, at tað skaðar trúvirðið hjá politiska myndugleikanum, um dagarnir einvíst verða skornir burtur.

Landsstýrismaðurin hevur nevniliga skotið upp at taka hesar dagar burtur úr dagatalinum hjá bólki 5, umframt at dagarnir, ið tá eru eftir, skuldu minkast við 50%.

### Føroyabanki

Meirilutin tekur undir við at verja Føroyabanka, men tekur ikki undir við totalfriðing, tí hildið verður, at hetta hevði gjørt tað truplari at staðfesta gongdina á Bankanum, eisini vísindaliga. Tí mælir meirlutin til, at ávís veiða við snellu verður loyvd á Føroyabanka – eisini í komandi fiskiári.

- Vit halda tað eisini vera týdningarmikið at gera tillagingar í dagatalinum stígvíst í samsvari við ta tøkniligu menning, sum er í vinnuni.

Meirilutin sigur, at tá ið talan er um verju av einstøkum fiskasløgum, er dagatalið ikki rætta amboðið. Tá eiga í staðin økisfriðingar at verða nýttar.

- Landsstýrið eigur at seta í verk vísindaliga kanning av áríninum av stóru økisfriðingunum við Føroyar. Heili 41% av landgrunninum eru friðað fyri trol, tó uttan at vit vita, hvussu nógv henda verja tryggjar fiskastovnarnar, sigur meirilutin í vinnunevndini.

# Fiskiflotin skal hava legudagar

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gerhard Lognberg mælir eisini til, at landsstýrismaðurin tekur stig til samráðingar við allar skipabólkar við tí endamáli at fáa eina semju um, at allur fiskiflotin skal liggja í 14 dagar um summarið – og frá 18. desember til 6. januar á hvørjum ári.

Løgtingsmaðurin skjýtir upp, at úrslitið av semjuni verður lagt fyri løgtingið sum uppskot til broyting í lógini um vinnuligan fiskiskap – at koma í gildi skjótast gjørligt.

Gerhard Lognberg heldur, at veiðitrýstið við hesum sum heild fer at minka meira, enn 3% skerjingin av døgum viðførir.

- Eg haldi eisini, at landsstýrismaðurin eigur at taka atlit til teir útróðrarbátar í bólki 5, sum hava havt loyvi at fiskað nakrar dagar á Føroyabanka og sum hava gjørt stórar íløgur í nautiska útgerð, sigur løgtingsmaðurin, sum heldur ikki tekur undir við, at djúpvatnstrolararnir koma við í fiskidagaskipanina.